# Kríggið oyðileggur ísraelska búskapin

**Tað var líkt til, at árið í ár skuldi gerast tað besta hjá ísraelsmonnum nakrantíð, men nú mugu allar tær búskaparligu forsagnirnar endurskoðast**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Hotellini har norðuri í Ísrael standa at kalla tóm, tí hvørki ferðafólk ella handilsfólk tora at gista har longur. Leygardagin rakti ein rakett hjá Hizbollah eitt av hotellunum í býnum Tiberias, og løtu seinni rindaði tann seinasti ferðamaðurin fyri seg og fór.

– Summarið er oyðilagt, sigur Modar Abbas, sum arbeiðir á einum hotelli í býnum Nahariya, við Aftenposten. Hann sigur, at fyri einari viku síðani vóru gestir á hvørjum einasta kamari, men nú er ikki ein einasti eftir. Hotellið stendur tómt mitt á hásumri, og hvønn dag verða bíleggingar avlýstar.

Tey, sum reka hotellini har norðuri í Ísrael, hava longu mist alla vón um at fáa ferðafólk í juli og august, sum annars plaga at vera teir góðu ferðamánaðarnir. Tað kemur serliga teimum, sum arbeiða á Park Plaza Hotel í Nasariya illa við, tí hotellið er spildurnýtt. Tað stendur tætt niðan frá strondini, men í dag hevur strondin ongan áhuga.

Nahariya er tann norðasti býurin í Ísrael. Har búgva 50.000 fólk, men í dag er býurin at kalla tómur, tí 70 prosent av fólkinum eru flýdd suðureftir, so tey kunnu kenna seg trygg fyri Hizbollah-rakettunum.

Støðan er tann sama aðrastaðni har norðuri í landinum. Tey, sum ikki eru flýdd, gera eftir ráðunum frá myndugleikunum um at halda seg innandura og helst í bumbutryggum rúmum. Tað hevur við sær, at fleiri hundraðtúsund fólk fara ikki til arbeiðis. Verksmiðjurnar standa stillar, og grøðin verður ikki heystað.

– Tað eru týðilig teknin um afturgongd í landbúnaðinum, ferðavinnuni og ídnaðinum, sigur leiðarin í tí lokala ráðnum í Ovara Galilea, Aharon Valenci, við blaðið Haaretz. Hann heldur, at tað eru serliga nógvar smáfyritøkur, sum eru um at fara á húsagang.

## Ávirkar landsbúskapin

Men stríðið við Hizbollah ávirkar ikki bara viðurskiftini har norðuri í Ísrael, tí tað rakar allan búskapin, og støðan er sera álvarssom, sigur tíðindaleiðarin á blaðnum Yediot Ahronot, Gad Lior, við Aftenposten.

Hann vísir á, at fyri bara einari viku síðani vístu forsagnirnar, at 2006 fór at verða eitt tað besta í ísraelsku søguni, og at búskaparvøksturin fór at liggja um 6,6 prosent. Men nú er alt vent á høvdið, tí nú verður roknað við trimum ella fýra prosentum í afturgongd.

Álopini teir seinastu dagarnar hava gjørt skaða fyri meiri enn eina milliard krónur, samstundis sum kríggið hevur kostað hermegini meiri enn eina milliard, og tað kemur búskapinum illa við, tí ísraelski búskapurin er sera viðkvæmur og verður lættliga ávirkaður av ófriði og hernaðaratgerðum, sigur Gad Lior.

Harafturat kemur, at ófriðarlig viðurskifti elva til misálit, og tá fólk ikki hava álit á tryggleikanum, rakar tað búskapin meint. Harafturat ávirkar tað hugin at gera íløgur í eitt nú hátøkni, haðani tveir triðingar av útflutningsvirðinum stava.

Søguliga gongdin tey seinastu tíggju árini vísir týðiliga, hvussu stóra ávirkan tryggleikin hevur á ísraelska búskapin. Árini eftir Oslo-avtaluna ímillum ísraelsmenn og palestinar vóru merkt av bjartskygni, og frá 1993 til 1999 vaks búskapurin heili 74 prosent. Men so byrjaði tann palestinski uppreisturin á heysti í 2000, og tað endaði við, at Ísrael hersetti Gaza-geiran og Vestara Áarbakka. Úrslitið sást beinanvegin, og frá 1999 til 2004 vaks búskapurin bara 18 prosent.

## Rakar meint

Eisini hesaferð hevur ófriðurin sína ávirkan. Teir fyrstu tríggjar dagarnar av kreppuni millum Ísrael og Hizbollah fall partabrævavirðið á marknaðinum í Tel Aviv 12 prosent, samstundis sum ísraelska gjaldoyrað er minkað fýra prosent í virðið mótvegis amerikanska dollaranum.

Tað verður verri enn, sigur Gad Lior, sum væntar, at stríðið ímillum Ísrael og Hizbollah fer at vara nakrar vikur afturat.

– Tað fer at raka búskapin meint, eftir at vit hava havt tvey góð ár, sigur ísraelski tíðindaleiðarin.

*(Kelda: Aftenposten)*

# Libanski búskapurin bumbaður langt aftur í tíðina



*Ísraelsku flogførini hava bumbað fleiri vegir og brýr í Libanon. Her verður ein týðandi brúgv sprongd í luftina*
*Mynd: Reuters*

**Ísraelsku álopini hava oyðilagt virði fyri tríggjar milliardir krónur**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Undir álopunum á Libanon hevur ísraelska flogvápnið lagt seg eftir at bumba støðir hjá Hizbollah umfrant libanska samferðslukervið. Sambært ísraelskum talsmonnum er endamálið at avbyrgja Libanon frá umheiminum og at forða Hizbollah at flyta teir báðar burturfluttu ísraelsku hermenninar.

Longu tann fyrsta dagin skutu ísraelsku flogførini fleiri rakettir eftir floghavnini í Beirut, so hon mátti latast aftur. Seinni bumbaðu flogførini fleiri brýr og vegir, teirra millum tann týdningarmikla vegin ímillum Libanon og sýriska høvuðsstaðin Damaskus. Harumframt bumbaðu ísraelsku flogførini orkuverk og oljugoymslur.

Libanski fíggjarmálaráðharrin, Jihad Azur, segði í gjár, at higartil hava tey ísraelsku álopini gjørt skaða fyri einar tríggjar milliardir krónur. Hann legði afturat, at talið umfatar bara skaðarnar á samferðslukervið og er ein fyribilsmeting.

Tey ísraelsku álopini hava eisini ávirkað ferðavinnuna nógv. Júst ferðavinnan er tann vinnan, sum hevur havt størsta framburðin í Libanon tey seinastu árini, og tí kemur tað stak illa við, at ísraelsmenn bumba landið í bestu ferðatíð, sigur Jihad Azur við Reuters.

Útlendskar keldur siga, at tey ísraelsku álopini hava bumbað Libanon nógv ár aftur í tíðina.